


# Ársfrágreiðing

# 2018

# Ársfrágreiðing 2018

Her verður í stuttum greitt frá virkseminum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd í 2018. Sambært viðtøkunum skal Ráðið fyri Ferðslutrygd í fyrsta lagi gera ferðsluna tryggari við at betra ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritakssemi, við støði í Nullhugsjónini.

## Ongin doyði í ferðsluni í 2018



Fyri fyrstu ferð í meiri enn hálva øld, misti ongin lívið av ferðsluvanlukku í Føroyum. Vit skulu heilt aftur til 1967 fyri at finna eitt álmanakka-ár, har ongin doyði í føroysku ferðsluni. Hetta er eitt sera jaligt úrslit, og líkist langt frá teimum syndarligu 70- og 80unum, har ferðsluvanlukkur kravdu nógv mannalív, serliga ung fólk í bestu árum.

Seinastu árini eru álvarsligu ferðsluvanlukkurnar vorðnar alsamt færri. Og tað er at fegnast um. Tað er ein týðilig ábending um, at tað miðvísa arbeiðið, sum er gjørt seinastu nógvu árini, ber frukt.

Herd lóggáva, eftirlit, betri og tryggari vegir, tryggari bilar og ikki minst áhaldandi upplýsing og átøk eru við til at gera okkum øll meiri upplýst og tilvitaði um vandarnar í ferðsluni og harvið okkara egna møguleika at gera mun.

Hóast ongin doyði í ferðsluvanlukku í 2018 er ongin orsøk at setast afturá. Føroyar eru smáar og okkara hagtøl eru smá. Tí kann ein álvarslig ferðsluvanlukka ávirka hagtølini ógvusliga. Týdningurin av at kanna og fyribyrgja øllum ferðsluóhappum við fólkaskaða (og at greina álvaran á skaðunum) er tí alsamt meiri neyðugur.



Tá vit samanbera okkum við hini norðurlondini, verða tølini brúkt við útgangsstøði í tal av deyðum í ferðsluni pr. 100.000 íbúgvar. Seinastu árini hava Føroyar ligið aftast samanborið við hini norðurlondini. Við tølunum fyri 2018 sær eitt sindur betri út og liggja vit í løtuni á beint omanfyri Finlandi við 4,1 deyð pr. 100.000 íbúgvar (ella 2,1 um árið – 5 ára miðal). Noreg, Svøríki og Danmark hava øll betri tøl at vísa á og tí er enn nógv at arbeiða fyri, til tess at fáa talið av deyðum og skaddum í ferðsluni niður.

**Ferðsluóhapp við fólkaskaða**

Í 2018 vóru 28 ferðsluóhapp við fólkaskaða. Hetta er á leið sama tal sum undanfarin ár. Talið er ikki broytt munandi síðani 2009-10, tá promillumarkið varð broytt í Føroyum.




Í 2018 skrásetti politiið harafturat 9 ferðsluóhapp við rúsdrekka/rúsevnum/heilivági – harav 2 við fólkaskaðum. Talið av rúsdrekka-relateraðum ferðsluóhappum er spakuliga minkandi. Og tað hevur tað verið síðani 2009, tá promillumarkið varð sett niður til 0,2.

Tó ávarar politiið um økt tal av bilførarum, sum verða tiknir fyri rúsevniskoyring.

Framhaldandi tørvar okkum betur hagtøl og neyvari greiningar av ferðsluóhappum við fólkaskaða.

## Landsfevnandi átøk í 2018

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur í 2018 framt átøk viðvíkjandi gáloysni, rúsdrekkakoyring, skúlabyrjan og ferð. Umframt árligu afturvendandi tiltøkini ferðsludagar fyri 8. flokkum, súkkluhjálmum, endurskinsvestum og taskuendurskinum til yngstu skúlanæmingarnar.

Til átakið um skúlabyrjan vóru kommunurnar bodnar við og nógvar teirra tóku av. Vit vóna at hetta samstarv kann halda fram og at fleiri kommunur ynskja at luttaka. Hetta so átøkini fáa størri slagmátt og røkka betur út í lokalu økini.

### Gáloysni



Við spurninginum ” Hvar eru tankarnir, tá tú koyrir bil” varð nýtt átak um gáloysni framt í januar 2018. Átakið varð endurtikið á heysti 2018. Boðskapurin kom fram í filmi, sum var vístur á alnótini, í miðlum og biografi. Eisini plakatir, vindeygaklistrimerki og ’halt-gák-bomm’ við átekningini ’tig og koyr’ vóru partur av átakinum.







Boðskaðurin í átakinum er greiður. Hvussu langt koyrir tú í blindum, um tú hyggur burtur frá vegnum í nøkur sekund. T.d. við at lesa sms-boð á telefonini. Koyr bil, tá tú koyrir bil.

Seinastu árini hava vit spurt føroyingar um teirra hugburð til nýtslu av handhildnari telefon, meðan koyrt verður. Parturin av fólki, sum siga seg ongantíð tosa í telefon, meðan tey koyra bil, er spakuliga vaksandi og í februar 2018 søgdu 57% seg ongantíð nýta handhildna telefon, meðan tey koyra bil. Men tey, sum siga seg gera hetta antin 2-4 ferðir um vikuna, ella dagliga eru heili 17%.






Aldursbýtið vísir, at millum eldru bólkarnar er talið á teimum, sum ongantíð nýta handhildna fartelefon, meðan tey koyra, markant hægri. Meðan tey yngru nógv oftari brúka fartelefonina, meðan tey koyra. Av teimum 18-29 ára gomlu siga 26% seg brúka telefonina, meðan tey koyra dagliga ella 2-4 ferðir um vikuna. Og talið fyri tey 30-39 ára gomlu er heili 33%.

Lítið er at ivast í, at tørvurin á framhaldandi átøkum á hesum økinum eru týdningarmikil og átakið verður eisini endurtikið í 2019. Hesa ferð hava kommunurnar fingið boðið at luttaka, eins og løgreglan verður partur av átakinum.

**Rúsdrekka**





.

Trygd og Ferðslutrygd mintu føroyingar á at steðga rúskoyring, har bygt var á filmin, 'Ein skeiv avgerð kann broyta nógv ... kanska alt'. . Gallupkanningar hava víst, at føroyingar vilja ikki vita av rúdsrekkakoyring. Heili 92% siga, at rúsdrekkakoyring kann "ikki" ella

"als ikki" verða góðtikin. 6% svara, at rúsdrekkakoyring skal helst ikki koma fyri. Í Ferðslutrygd eru vit ikki bilsin. Hugburðurin ímóti rúsrekkakoyring er óvikiligur millum tey flestu. Men hjá summum kann vera langt frá hugburði til atferð. Tí rúsdrekkakoyring er framvegis orsøk til álvarsligar ferðsluvanlukkur. Umframt at filmurin varð vístur á portalum, bar eisini til at fáa plakatir, klistrimerki og tatoveringar við sama boðskapi.

**Ferð**

Saman við Betri Trygging mintu vit føroyingar á at halda hámarksferðina. Átakið tók støði í filminum, 'Hin dagin eg hevði skund'. Gallupkanning frá sep 2018 vísti, at 46% av føroyingum søgdu seg vanliga halda hámarksferðina. Tað er lítil kynsmunur millum, hvussu skjótt fólk siga seg koyra.




**... men fleiri staðni koyra 60% av bilunum skjótari enn 80 km/t**




Landsverk ger mátingar ymsastaðni kring landið, hvussu nógvir bilar koyra og hvussu skjótt. Greitt er, at summa staðni eru heilt nógvir bilar, ið koyra skjótari enn loyvt. Fleiri staðni eru 60% av bilunum, sum koyra skjótari enn 80 km/t. Her er ofta talan um bein strekki, men hetta eru samstundis vegir, har yvirhálað verður. Føroyskir landsvegir eru bygdir til 80 km/t.

**29% av føroyingum mæla til sjálvvirkandi ferðeftirlit**

Spurd, hvat føroyingar halda besta háttin vera at fáa bilførarar at halda hámarksferðina, vísir gallupkanningin frá sep 2018, at á fyrsta plássi við 29% liggur sjálvvirkandi ferðeftirlit, har mynd verður tikin av bilføraranum. Hetta er skipanin sum vit kenna frá øðrum europeiskum londum. 26% mæla til meiri politieftirlit og 20 % mæla til hægri bót.




**Skúlabyrjan**

Í august 2018, tá skúlarnir byrjaðu aftur, framdi RFF átak í samstarvi við kommunur, har bilførarar vórðu mintir á at ansa eftir skúlabørnunum við skúlarnar. Hetta við plakatum. Endamálið var at gera vart við, at í sambandi við skúlabyrjan eru aftur fleiri børn í ferðsluni, og eisini børn, sum kanska eru nýggj í ferðsluni og hartil smá og tískil ikki síggjast so væl.

Í nøkur ár hevur Ráðið fyri ferðslutrygd boðið kommununum at luttaka í átøkum og talið av kommunum, ið taka av hesum tilboði veksur fyri hvørja ferð. Í eftirmetingum, sum kommunurnar gjørdu eftir átak um ferð í 2017, vóru fleiri kommunur, ið vístu á, at plakatir í sambandi við skúlabyrjan vóru viðkomandi. Hetta sást aftur í hesum átakinum, tá heili 12 kommunur luttóku. Hesar vóru: Tórshavnar -, Klaksvíkar -, Runavíkar-, Vága -, Fuglafjarðar -, Eiðis -, Hvalbiar -, Kvívíkar -, Sunda -, Skopunar -, Sjóvar kommuna og Eysturkommuna.



# Afturvendandi átøkini

## Ferðsludagar fyri 8. flokkum





Ferðsludagarnir vórðu hildnir fyri 8. flokkum eins og seinastu 20 árini - fyrstu ferðsludagar fóru av bakkastokki í 1998. Hesi árini er tiltakið tillaga og dagført, men í høvuðsheitum er yvirskipaða málið tað sama - at læra um vandar í ferðsluni, avleiðingar av avgerðum okkara og tvístøðum um hvat kann gerast fyri at fyribyrgja og hvat er 'rætta' reaktiónin, tá skaðin er hendur. Tiltakið er samskipað av Ferðslutrygd og stuðlað av Trygd og Betri Trygging.





## 1-1-2 dagar í Havn og í Eysturoynni

RFF tók lut á árligu 1-1-2-døgnum, har løgreglan, brandstøðin, sjúkraflutningstænastan og Ferðslutrygd møta elstu barnagarðsbørnunum. Dagurin varð hildin í Badmintonhøllini í Havn og við Eydnuna á Oyrarbakka.






**Súkkluhjálmar, endurskinsvestar og taskuendurskin til 1. floksnæmingar**
Sum helst tey einastu í heiminum fáa øll børn í Føroyum, sum fara í 1. flokk, hvør sín hjálm til gávus í samstarvi millum Betri Trygging og Trygd.




## Stjóraskifti

Eftir góð 7 ár sum stjóri fyri Ráðnum fyri Ferðslutrygd, valdi Brynhild Høgnadóttir at takka fyri seg og royna nýggjar leiðir. Lýst var tí eftir nýggjum stjóra og 1. desember tók Lovisa Petersen Glerfoss við starvinum. Lovisa er 7. stjórin hjá RFF, síðani stovnanina í 1976.

**Hesi hava stjórnað Ráðnum fyri ferðslutrygd:**
Eli Nolsøe 1976 - 1978
Oskar Hermansen 1978
Olivur Næss 1978 – 1992
Jón Kragesteen 1993 – 2007
Sølvi Reinert Hansen 2007 – 2011
Brynhild Høgnadóttir 2011 – 2018
Lovisa Petersen Glerfoss 2018 –

Á almennari móttøku, stutt fyri jól, valdu mong at nýta høvið at siga væl lýdda stjóranum farvæl og at heilsa uppá nýggja stjóran.




## Framlítandi virksemi RFF

Við góða ferðsluárinum 2018 í skjáttuni, við 0-deyðum í ferðsluni, kunnu vit ikki annað enn frøðast. Arbeiðið er tó á ongan hátt liðugt. Neyðugt er framhaldandi at virka fyri átøkum at betra um vanarnar í ferðsluni, soleiðis at gongdin heldur fram. Hetta í góðum stevi við aðrar partar, sum á hvønn sín hátt arbeiða fyri betri ferðslutrygd. Átøk mótvegis stóru skaðafaktorunum í ferðsluni (ferð, gáloysni og rúsdrekka) halda sostatt fram, eins og afturvendandi tiltøkini mótvegis børnum og ungum.

Í fleiri ár hevur Ráðið fyri Ferðslutrygd staðiliga víst á týdningin at dagføra ferðslutrygdarætlanina, sum gekk út í 2015. Hetta so tað verður øllum greitt, hvørji yvirskipað tiltøk, ið partarnir, ið varða av ferðslutrygdini, meta hava størst týdning.

Hetta arbeiðið er loksins farið í gongd á vári 2019 og væntast klárt til almenna framløgu um miðjan maj.

Við dagførdu ferðslutrygdarætlanini er týdningurin av betri hagtølum enn einaferð staðfestur, til tess at kunna málrætta átøkini, har tað veruliga ger mun. Harumframt stendur tilmælið um eina skaðanevnd við, soleiðis at álvarsligu vanlukkurnar kunnu nágreinast og vónandi fyribyrgjast í framtíðini.

Endaliga er sera týdningarmikið, at ferðslutrygdarætlanin javnan verður dagførd, so hon altíð vísir røttu myndina av dagsins avbjóðingum á ferðslutrygdartøkinum og soleiðis at tað altíð er púra greitt, hvørji málini eru og hvør varar av, at tilmælini verða framd og at málini verða fylgd upp.

Ráðið fyri Ferðslutrygd fer, við støði í dagførdu ferðslutrygdarætlanini, at arbeiða miðvíst við teimum tilmælum, sum RFF varar av – m.a. átøk, undirvísing og hugburðskanningar.

*5. apríl 2019*
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*